FCK smokkaði eitt sindur

Christian Høgni spældi í ein tíma, Todi saknaði Zuma, og málleysi javnleikurin hjá FCK ímóti AB hevði við sær, at munurin fram til Brøndby øktist við tveimum stigum

ÚTISETAR
Jóannes Hansen

Dreymurin hjá FCK at fáa Brøndby aftur og harvið at vinna meistaraskapin er longri frá veruleikanum nú, enn hann var undan vikuskiftinum.

FCK hevði í Parkini vitjan av grannunum AB. Ikki færri enn 17.500 áskoðarar møttu upp. Sjálvandi vóru tey flestu FCK viðhaldsfólk. Tey staðfestu tað, sum tað so ofta verður tikið til í Onglandi. Har verður sagt, at tað er torførari hjá felagum í London at vinna meistaraskapin, enn tað er hjá øðrum felagum. Orsøkin verður stogd at vera, at tað eru so nógv felog í høvuðsstaðnum í bestu deildini. Grannadystirnir eru altíð tættir, og tí missa eitt nú Arsenal og Chelsea fleiri stig ímóti lægru staddu høvuðsstaðarfelagunum, enn eitt nú Liverpool og Manchester United gera.

Um hagtølini tey seinnu árini eru í tráð við hesa útsognina, vita vit ikki, men soleiðis verður ofta tikið til í Onglandi.

Í Keypmannahavn kunnu teir í FCK skriva undir uppá, at teir ofta hava havt tað strevið ímóti Lyngby, sum nú er farið púrasta í hundarnar, og ímóti AB.

Nógvu áskoðararnir vóru vitni til gott undirhald í Parkini. FCK var leikliga greitt omaná, men teir megnaðu ikki at fáa úrtøku burturúr góðum møguleikum. Todi Jónsson var á vøllinum fyrstu 75 minuttirnar. Hann var einar tríggjar ella fýra ferðir í stoðum, sum væl kundu havt mál við sær, men tað eydnaðist ikki.

Í síðstu viku segði Zuma, at tað gekk best hjá honum, tá hann hevði Toda undir liðini. Sunnudagurin vísti, at tað roynist best hjá Toda, tá hann hevur Zuma undir liðini. Zuma var sjúkur í síðstu viku. Leygardagin ljóðaði, at hann fór at vera við ímóti AB, men hann var ikki nóg væl fyri at spæla.

Tá Todi, sum í BT fekk sjey fyri avrikið, fór av vøllinum, kom Carsten Fredgaard inn. Peter Møller spældi alla tíðina fyri Zuma. BT gav honum ikki betri skoðsmál enn eitt fimm tal.

Tvey omanfyri FCK

Undan vikuskiftinum var tað roknað meiri sannlíkt, at munurin frá Brøndby og til FCK skuldi styttast tvey stig, heldur enn at hann skuldi leingjast. Men kortini longdist hann.

Brøndby var í Silkeborg, og har eydnaðist teimum at fáa fult. Men tað stóð nógv á. Mogens Krogh í málinum hevði fleiri meistarligar bjargingar, áðrenn tað á tímanum eydnaðist BIF at koma á odda. Eitt korter seinni javnaði Silkeborg, og tá tað bara restaðu tríggir minuttir, var tað Peter Madsen, toppskjúttin hjá Brøndby, sum skoraði sigursmálið.

AaB fór sunnudagin fram um FCK. Teir vóru í Lyngby, og har var eingin ivi. Gestirnir vunnu 7–0, og teir høvdu møguleikar at vinna uppaftur meiri. Nýggju Lyngby spælararnir hildu í vetur, at tað var spennandi og ein stór avbjóðing, at teir burturúr ongum komu í superliguna. Tað hevur síðani vetrarsteðgin verið sjónligt, at tað krevst meiri enn góður fótbóltshugur at standa seg í bestu deildini, og tað varð aftur sunnudagin so rudduliga staðfest.

Esbjerg helt tørn um fjórða plássið, tá teir á heimavølli vunnu 2–0 ímóti AGF, sum framvegis er í vanda fyri at missa plássið í bestu deildini.

Christian Høgni í ein tíma

Við málleysum javnleiki á heimavølli ímóti FC Midtjylland lyfti Vejle seg upp um niðurflytingar strikuna. Við føroyskum eygum var tað hugaligt at staðfesta, at Christian Høgni Jacobsen var valdur millum teir fyrstu ellivu á heimaliðnum í Nørre skóginum.

Christian Høgni spældi ein lítlan tíma. So varð hann avloystur av fremmanda manninum Jader Spindler. Ofta vísir tað seg, at spælararnir, sum verða skiftir út, fáa harðan dóm í fjølmiðlunum, og serliga tá talan er um serliga kendar spælarar. Hetta kann Christian Høgni skriva undir uppá. Í BT fekk hann eitt fimm tal.

OB hevði ikki tapt í tíggju dystum, tá teir fingu vitjan av Viborg, sum leingi var í vanda fyri at flyta niður, men sum nú tykist vera sloppið undan tí hóttanini. Viborg punkteraði góðu gongdina hjá OB. Søren Frederiksen skoraði einasta málið, tá ein hálvur tími var farin.

Danska superligan

		d	v	- j	- t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Brøndby	23	15	- 5	- 3	54	19	35	50
2	AaB	23	13	- 4	- 6	40	29	11	43
3	FCK (M)	23	11	- 8	- 4	38	18	20	41
4	Esbjerg	23	11	- 4	- 8	36	33	3	37
5	OB	23	9	- 8	- 6	36	33	3	35
6	FCM	23	8	- 9	- 6	28	19	9	33
7	AB	23	8	- 9	- 6	33	25	8	33
8	Viborg	23	6	-10	- 7	26	27	-1	28
9	Silkeborg	23	5	- 5	-13	24	32	-8	20
10	Vejle	23	5	- 5	-13	28	55	-27	20
11	AGF	23	4	- 7	-12	26	38	-12	19
12	Lyngby	23	2	- 8	-13	20	61	-41	14

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

		d	v	- j	- t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Køge	15	12	- 1	- 2	32	13	19	37
2	Frem	17	10	- 5	- 2	37	17	20	35
3	HFK Sønderj.	16	10	- 3	- 3	32	19	13	33
4	B 1913	17	10	- 3	- 4	31	24	7	33
5	Farum	16	9	- 5	- 2	33	22	11	32
6	Herfølge	17	8	- 5	- 4	26	19	7	29
7	AC Horsens	17	7	- 5	- 5	23	17	6	26
8	Randers F.	17	6	- 5	- 6	23	21	2	23
9	FC Aarhus	16	5	- 5	- 6	23	26	-3	20
10	Brønshøj	17	5	- 4	- 8	26	31	-5	19
11	B 1909	17	5	- 4	- 8	30	40	-10	19
12	Hvidovre	17	3	- 6	- 8	24	34	-10	15
13	Fredericia	16	3	- 4	- 9	19	23	-4	13
14	B93	17	3	- 4	-10	22	38	-16	13
15	Kolding IF	17	3	- 2	-12	30	46	-16	11
16	Skive	17	2	- 3	-12	19	40	-21	9

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), Johan Byrial Hansen (Fredericia)

Trý føroysk tap

Øll trý liðini í næstbestu donsku deildini, sum hava føroyingar millum spælararnar, taptu í vikuskiftinum

ÚTISETAR
Jóannes Hansen

Óli Johannesen, Johan B. Hansen og Atli Gregersen høvdu í vikuskiftinum ein felagsnevnara, syum teir heilt víst ikki eru serliga fegnir um. Teir eru føroyskir útisetar á donskum liðum, sum í vikuskiftinum taptu í næstbestu deildini.

Gamla felagið hjá Jákupi Mikkelsen, Herfølge, hevur ikki havt tað nakað serligt í hesum kappingarárinum. Sum hjá so mongum øðrum hevur verið neyðugt at repa seglini, og tað verður ikki mett, at felagið hevði verið nóg væl fyri at flutt upp aftur nú.

Í Hvidovre tykist blussið ikki at vera nakað serligt. Figgjarligu trupulleikarnir og tað, at flestu spælararnir eru á veg burtur frá felagnum kveikir neyvan undir stríðshugin. Nú verður setningurin fyrst og fremst at halda niðurflytingina burtur. Tað er ivaleysa stór avbjóðing. Óli Johannesen var á liðnum, sum tapti 2–1.

Johan B. Hansen er framvegis sáttmálabundin at OB. Í fjør megnaði hann, eftir skaða tíðliga á árinum, ikki at stríða seg á besta liðið. Sannførandi gongdin í heyst og aftur í vár hevði við sær, at vánirnar fyri 1. liðs fótbólti ikki vóru nakað serligar. Tí varð Johan B. Hansen útleigaður til Fredericia. Har er setningurin at halda liðið omanfyri strikuna. Tað er framvegis ivasamt, hvussu tað fer at eydnast. Í vikuskiftinum var mótstøðuliðið HJK Sønderjylland, sum ætlar sær upp aftur í bestu deildina.

HJK vann1–0, og harvið hava teir kós uppeftir, meðan Fredericia hevur kós skeiva vegin.

Randers Freja var í Odense, og teir taptu 1–0 ímóti B1913, sum eftir fleiri ár í aldudalinum rættuliga er komið fyri seg, og tykist vera besta boðið upp á næstbesta liðið í triði størsta býnum í Danmark.

Óli Johannesen og Hvidovre taptu annað vikuskiftið á rað

Málleyst

Hull City hevur ikki skotið mál í trimum dystum á rað, men hesa ferð eydnaðist um ikki annað at forða mótstøðumonnunum í at skora

ONGLAND
Jákup Mørk

Síðani jólasteðgin hevur fótbóltstilveran verið alt annað enn hugalig hjá Julian og teimum í Hull City. Eitt trygt pláss ímillum liðini, sum skulu spæla play-off, er broytt til heldur skuffandi 9. pláss, og seinastu tveir dystirnar hevur liðið ikki so frægt sum skotið eitt mál.

Tað gjørdu teir heldur ikki, tá teir leygardagin leiktu móti Leyton Orient, sum er í niðaru hálvu av stigatalvuni. Hinvegin megnaðu teir at halda málið reint, og tað er so í øllum førum nakað, sum hevur frøtt heimaáskoðararnar.

Á heimasíðu felagsins verður sostatt skrivað, at nógv bendir á, at dysturin móti Orient kann gerast eitt slag av vend fyri liðið. At leikararnir nú veruliga stríddust í felag, heldur enn at fara í sjálvdrátti, og so er bert eftir at fáa hin partin av spælinum at rigga.

Hóast venjaraskiftið, so er Julian framvegis fastur fúsur á liðnum hjá Hull, og eins og vanligt spældi hann samfullar 90 minuttir á miðvøllinum hesaferð.

Zwolle í oddin

Súni Olsen var ikki á vøllinum, tá Zwolle um vikuskiftið vann eitt sera týðandi fet í uppflytingarstríðnum , har teir nú eru ájavnir oddaliðnum í stigum

HOLLAND
Jákup Mørk

FC Zwole úr Hollandi hevði um vikuskiftið vitjan av RBC Roosendaal. Undan dystin var Zwolle á triðja plássinum, eitt stig aftan fyri RBC á øðrum plássinum, og tí var tað av alstórum týdningi, at nakað munagott spurdir burtur úr dystinum.

Javnt í oddinum

Tað gjørdi tað eisini. Við einum máli hvørju megin steðgin vann Zwolle dystin, og vunnu teir sær harvið eitt sera týðandi fet í uppflytingarstríðnum.

Í hollendskum miðlum verður sagt, at tað fyrst og fremst var eitt liðavrik, sum tryggjaði Zwolle sigurin. Kanska høvdu gestirnir fyrstu løtuna tað meira vandamikla spælið, men Zwolle stóð ímóti trýstinum, og um miðjan hálvleikin kundi Bosschaart seta hol á.

Hetta setti enn meira ferð á heimaliðið, og tó at gestirnir royndu at trýsta, so var tað nú Zwolle, sum hevði yvirvágna í dystinum. Stutt eftir steðgin sendi Bosschaart enn einaferð bóltin í netið, soleiðis at hann í hesum dystinum tvífaldaði samlaði máltalið hjá sær hetta kappingarárið.

Umframt, at sigurin kom væl við hjá Zwolle, so gjørdist hann ikki verri av, at oddaliðið, Excelsoir, á heimavølli tapti fyri den Haag. Excelsoir hevur størsta partin av árinum havt eina hampuliga trygga leiðslu, men nú kann munurin til Zwolle bert gerast upp í málum, og enn eigur Zwolle heimadyst móti Excelsoir tilgóðar. Hesin verður leiktur 26. apríl.

Hollendska toto-deildin

		d	v	- j	- t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Excelsoir +	28	17	- 7	- 4	64	26	38	58
2	FC Zwolle +	28	17	- 7	- 4	49	28	21	58
3	RBC Roo'daal	28	17	- 5	- 6	63	32	31	56
4	ADO Den Haag	28	15	- 7	- 6	46	29	17	52
5	Emmen	28	15	- 7	- 6	45	31	14	52
6	Cambuur/L. +	28	13	- 6	- 9	43	31	12	45
7	FC Volendam	28	11	- 7	-10	50	41	9	40
8	Heracles A.	28	12	- 4	-12	45	45	0	40
9	BV Veendam	27	11	- 6	-10	47	43	4	39
10	Storm/Telstar	28	9	- 9	-10	43	37	6	36
11	Haarlem	28	10	- 6	-12	34	37	-3	36
12	Dordrecht '90	27	8	- 9	-10	49	49	0	33
13	Helmond Sp.	28	7	-11	-10	29	41	-12	32
14	G.A. Eagles	28	7	- 8	-13	37	49	-12	29
15	VVV	28	9	- 2	-17	43	59	-16	29
16	MVV	28	6	- 7	-15	38	54	-16	25
17	Eindhoven	28	5	- 6	-17	39	67	-28	21
18	Top/Oss	28	3	- 4	-21	20	85	-65	13

Perioduvinnararnir eru merktir »+«
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

Enska 3. deild

		d	v	- j	- t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Plymouth	39	26	- 8	- 5	59	25	34	86
2	Luton	41	26	- 6	- 9	82	44	38	84
3	Mansfield	40	21	- 7	-12	61	47	14	70
4	Scunthorpe	41	18	-12	-11	70	51	19	66
5	Cheltenham	38	17	-14	- 7	58	42	16	65
6	Rochdale	39	17	-14	- 8	52	41	11	65
7	R&D	41	17	-12	-12	56	47	9	63
8	Shrewsbury	41	17	-10	-14	59	49	10	61
9	Hull C.	40	16	-11	-13	52	39	13	59
10	Kidderm.	40	17	- 8	-15	49	41	8	59
11	Hartlepool	41	15	-11	-15	60	46	14	56
12	Southend	41	14	-11	-16	48	49	-1	53
13	Exeter	41	14	-10	-17	45	66	-21	52
14	Swansea	41	13	-11	-17	49	60	-11	50
15	Macclesfield	41	13	-11	-17	36	48	-12	50
16	Carlisle	39	11	-13	-15	44	47	-3	46
17	Oxford Utd.	41	11	-13	-17	50	54	-4	46
18	Leyton O.	41	12	-10	-19	52	66	-14	46
19	Darlington	40	11	-11	-18	47	61	-14	44
20	Torquay	41	10	-13	-18	38	57	-19	43
21	Lincoln C.	40	10	-12	-18	39	54	-15	42
22	Bristol R.	40	10	-11	-19	36	50	-14	41
23	York	38	11	- 8	-19	43	63	-20	41
24	Halifax	41	7	-11	-23	31	69	-38	32

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

Á aðalfundi 5. apríl verður lagt fram uppskot um at skipa Føroya Sparikassa sum partafelag.

Tekna teg sum ábyrgdara í Føroya Sparikassa innan 5. apríl 2002. So fært tú møguleikan at gerast partaeigari í Føroya Sparikassa P/F.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo